# Nú skal slagið standa

**Í kvøld skulu føroyameistararnir úr HB spæla fyrra dystin móti litaviska meistaraliðnum Kaunas í undankappingini til Champions League. Dysturin kann hava sera stóran týdning fyri Havnar Bóltfelag, og tí er serliga nógv gjørt burtur úr fyrireikingunum.**

CHAMPIONS LEAGUE
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*




*Teir báðir donsku spælararnir, ið HB hevur leigað til dystirnar móti Kaunas, komu til landið mánakvøldið. Her eru teir avmyndaðir saman við stjóranum í Havnar Fótbóltur, Steinfinni Mittelstein. Tað er Jan Larsen vinstrumegin og Martin Nielsen høgrumegin.*

*Mynd: www.hb.fo*

Um so er, at HB hevði megnað at bast litavisku meistarunum, so stendur allarhelst enska stórfelagið Liverpool, ið vann Champions League farna kappingarár, og bíðar fyri framman. Enska liðið skal spæla móti walisiska TNS í sínum undanumfari, og tað verður mett sum ein ógvuliga løtt uppgáva hjá Liverpool

Í HB eru tey fullvæl greið yvir, at tað verður ógvuliga trupult at røkka næsta umfarinum, men um tað skuldi hent seg, so hevði ein uppgerð móti Liverpool havt við sær eina eyka inntøku upp á slakar 10 milliónir krónur fyri havnarfelagið, verður mett.

### Allir mans klárir

Í eini roynd at verða so væl fyri sum møguligt, hevur HB keypt allar sínar leikarar leysar frá arbeiði mánadag, týsdag og mikudag í hesi vikuni, og seinnapartin í gjár savnaðist hópurin á Hotel Hafnia, har teir hava gist í nátt og verið saman til dystin í kvøld.

Tá ið vit í gjár hittu leikandi venjaran hjá HB, Heina Fernandez, kundi hann fegnast um, at allir mans eru tøkir til dystin móti Kaunas.

- Vit hava ongan skaddan leikara í løtuni. Bárður Mortansson hevur verið skaddur, men hann fekk ein hálvan tíma á vøllinum sunnudagin, og ikki kann sigast annað enn at hann gjørdi tað gott, sigur Heine Fernandez.

Í dystinum móti ÍF sunnudagin kom Bárður á vøllin saman við Heina Fernandez, og teir báðir fingu tvey mál í part tann hálva tíman, ið teir vóru á vøllinum. Spurdur um góða avrikið hjá teimum báðum fer at hava við sær, at onkur útskifting verður framd í álopinum í mun til byrjunaruppstillingina móti ÍF, sigur Heine Fernandez:

- Tað dugi eg ikki at siga enn. Vit hava eina venjing afturat undan dystinum, og hon verður avgerandi fyri, hvørjir fara at teljast millum teir fyrstu ellivu, sigur HB-venjarin.

### Danskur styrkur komin

Við í hópinum hjá HB verða eisini tveir nýggir leikarar, nevnliga teir báðir danirnir, Jan Larsen og Martin Nielsen, sum komu til landið mánadagin.

Eftir ætlan skuldu teir báðir koma sunnudagin, men floglíkindini í Vágum forðaðu fyri hesum, og ístaðin fingu teir høvi at uppliva bæði Ísland og Noreg, áðrenn teir kundu stíga á føroyska jørð.

Tá ið HB hevur fingið hesar báðar donsku leikararnar til dystirnar móti Kaunas, tykist tað sjálvsagt, at teir báðir verða við í byrjunaruppstillingini hjá føroyameistarunum í kvøld. Heine Fernandez vil tó einki siga, um so er, ella um hvørjir leikarar verða noyddir at víkja fyri teimum báðum dønunum.

### Skulu halda konsentratiónina

Hjálparvenjarin hjá HB, Albert Ellefsen, var herfyri í Litava og hugdi at einum dysti hjá Kaunas, og hann hevur síðani greitt Heina Fernandez frá tí, ið hann sá har yviri.

- Vit vita, at talan er um eitt lið, sum er rættuliga væl fyri kropsliga, og sum kann spæla skjótan fótbólt. Albert legði eisini til merkis onkran einstakan spælara, ið tykist hava ein rættuliga avgerandi leiklut á liðnum, sigur Heine Fernandez.

Leikandi venjarin hjá føroyameistarunum heldur tað verða ógvuliga umráðandi, at liðið heldur konsentratiónina allan dystin, tí gert tú eitt mistak, kanst tú rokna við, at tað verður revsað beinanvegin.

- Vit noyðast at ansa eftir, at vit ikki gera mistøk, og tað er serliga í uppspælinum, at tað er umráðandi. Missa vit bóltin í uppspælinum, er vandi fyri, at teir revsa okkum, áðrenn vit eru komnir upp á pláss í verjupartinum. Somuleiðis ræður um, at vit eru ógvuliga konsentreraðir í deyðbóltsstøðum, sigur Heine Fernandez.

### Harðari enn vanligt

HB-venjarin sigur, at leikararnir skulu verða greiðir yvir, at teir í kvøld skulu á vøllin og spæla ein altjóða dyst, og at stórur munur er á hesum dystinum og einum dysti í heimligu kappingini.

- Í altjóða fótbólti er tað tann sterkasti, sum vinnur. Dómararnir loyva nógv meiri, og tí skulu vit ikki verða bangnir fyri at geva aftur av somu skuffu í nærdystunum. Teir eru ógvuliga væl fyri kropsliga, og tað verður ógvuliga trupult hjá okkum at standa mát við teir á tí økinum. Í Føroyum verður nógv minni loyvt, og tað verður floytað fyri næstan hvønn einasta nærdyst, heldur Heine Fernandez.

### Hava hitt Kaunas áður

Fyri tveimum árum síðani hitti HB eisini Kaunas í Champions League undanumfarinum, og tá vann litaviska liðið 1-0 í Føroyum og 4-1 í Litava, men munurin á liðunum báðum var ikki so stórur, sum tað á pappírinum kundi sæð út til.

Í HB vóna tey, at tað í ár skal gerast eitt munandi betur úrslit, og dreymurin er sjálvsagt, at litaviska meistaraliðið skal koppast, soleiðis at Liverpool og milliónirnar gerast veruleiki.

Dysturin millum HB og Kaunas verður á Tórsvølli í kvøld klokkan 19.00

## Badminton og fimleikur rúka út av Oyggjaleikum

**Endaliga avgerðin um, hvørjar ítróttargreinar verða við á næstu Oyggjaleikunum er tikin. Judo sleppir inn í hitan aftur, men fimleikur og badminton rúka út**

OYGGJALEIKIR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

**Lerwick:** Fyrireikararnir á Rhodos hava nú gjørt endaliga av, hvørjar ítróttargreinar vera við á Oyggjaleikunum har í 2007.

14 ítróttargreinar verða við, og meðan greinar sum judo, triathlon og tennis koma inn aftur í hitan, verða badminton og fimleikur koyrd út í kuldan.

Valið av ítróttargreinum hongur saman við, hvørjar fasilitetir vertirnir hava at bjóða, og Rhodos heldur seg ikki kunna skipa fyri eitt nú kappingum í badminton og fimleiki.

Badminton hevur altíð verið við til Oyggjaleikir, meðan fimleikur ikki hevur verið við hvørjaferð.

Oyggjaleikirnir á Rhodos verða í døgnum frá 30. juni til 7. juli í 2007.

## Katrin gjørdist nummar tvey í Sveits

Føroyska róðrarkvinnan Katrin Olsen gjørdist saman við bátafeløgunum umborð á danska dupultscullaranum nummar tvey í altjóða kapping í Luzern um vikuskiftið.

Katrin og bátafelagarnir vunnu sítt innleiðandi umfar leygardagin, men í finaluni vóru teir akkurát ov stuttar og noyddust at lúta fyri Kina, sum gjørdist einans 0,29 sekund framman fyri danska bátin.

Katrin Olsen sigur á heimasíðuni hjá Havnar Róðrarfelag, www.drekin.fo, at tær vóru nokk so skuffaðar eftir róðurin, men tó ikki heilt ónøgdar við silvurið.

Nú eru tær úttiknar til at HM í Japan, og tað verður so arbeitt fram ímóti nú. Annars kemur manningin á vitjan í Føroyum um ólavsøkuna, so at tær sleppa at uppliva føroyskan kappróður.

**tn**